## Nýggjur busssáttmáli



Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hinumegin skrivaðu 20. december 2007 undir semju um busssáttmálan fyri tíðarskeiðið 1. mai 2007 til 1. mai 2010. Tað skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari í morgun. Semjan hevur við sær, at busssáttmálin nú fylgir høvuðssáttmálunum millum feløgini soleiðis, at tá hesir seinnu verða dagførdir, verður henda dagføring av sær sjálvum førd yvir á busssáttmálan. Vinnuhúsið skrivar, at umframt eina serliga viðbót, eru hækkingarnar í løn, eftirløn og starvsaldri tær somu sum tær hækkingar, semja í mai var um fyri høvuðssáttmálarnar.

## Napoli druknar í ruski

Gøturnar í suðuritalska býnum Napoli eru um at flóta yvir í ruski. Einki rusk er heintað í tvær vikur, og íbúgvarnir eru nú í berum vónloysi byrjaðir at seta deld á stóru ruskdungarnar. Men hetta førir við sær giftug gassskýggj, sum fólk so anda niður í seg. Myndugleikarnir hava heitt á børn um ar verða verandi heima frá skúlanum, tí tað er beinleiðis vandamikið at ferðast í gøtunum. Grundin tikl hetta der, at lossiplássini í býnum snøgt sagt eru full, og hetta er ein stórur heildartrupulleiki fyri íbúgvarnar. Einastu, sum fegnast um støðuna, eru rotturnar, skrivar Aftonbladet.se

# Hvar er eftirlitið?

**Tað skilst á siglandi monnum, at virðingin fyri Skipaeftirlitinum er munandi minni í dag, enn tá ið eftirlitið var á donskum hondum. Eftirlitið sæst at kalla ikki umborð á føroyskum skipum longur, og hetta er nú farið at órógva føroysk sjófólk**

SKIPAEFTIRLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Eftirlitið við føroyska skipaflotanum var nógv meira sjónligt fyri yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum, siga føroysk sjófólk*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Tað eru fiskimenn, sum ikki eru tryggir við umstøðurnar umborð á skipum longur, og tað eru eisini teir, sum treyðugt vilja avstað við summum skipum.

Tað sigur fiskimaður, sum hevur vent sær til Sosialin.

Hann vísir á, at síðan Skipaeftirlitið varð yvirtikið á føroyskar hendur, hevur lítið og einki verið at sæð til nakað eftirlit.

- Tá ið Statens Skibstilsyn hevði ábyrgdina av eftirlitinum, vóru fólk javnan umborð á føroyskum skipum, og tá kundi tú eisini fáa ófráboðaða vitjan. Slíkt er farið í søguna við yvirtøkuni.

Fiskimaðurin sigur, at vantandi eftirlitið er vorðið umrøðuevni umborð á fleiri skipum, og tað eru menn, sum aftra seg við at fara umborð á summi skip.

- Vit eru ikki tryggir við umstøðurnar, og vantandi eftirlitið fremur avgjørt ikki hugin hjá skipaeigarum og yvirmonnum í sama mun sum áður at hava øll viðurskifti dagførd, sigur hann.

### Vátta tað sama

Sosialurin hevur eisini spurt aðrar fiskimenn og menn, sum sigla fyri eitt nú Strandfaraskip Landsins. Teir siga tað sama, sum fiskimaðurin, sum vendi sær til okkara.

- Krøvini til alla sigling eru økt, men samstundis síggja vit einki til okkara Skipaeftirlit. Í sínari tíð fingu vit javnan vitjan av umboðum fyri Statens Skibstilsyn, og tað var ikki so sjáldan, at tey komu ófráboðað.

Skipari sigur, at tað skapti eina størri virðing og eitt størri ansni fyri trygdini, at tú kundi fáa vitjan av eftirlitsfólki.

- Tú gekk alla tíðina og hugdi at, um nú alt var í lagi, tí tú visti ongantíð, nær teir kundu koma. Knappliga ein dagin kundi eftirlitsmaður standa á dekkinum og siga, at hann fór líka at ganga runt og hyggja at skipi og trygdarútgerð. Eg haldi, at hetta hevði eina ógvuliga góða ávirkan á trygdarviðurskiftini umborð.

### Klassin í staðin

Skiparin sigur, at nú er tað klassin, sum av og á kemur umborð á skipini at kanna viðurskiftini fyri Skipaeftirlitið.

- Men sum eg havi skilt, ger klassin hetta arbeiði eftir bílegging frá Skipaeftirlitinum, og klassin hevur ikki skyldu til at møta upp uttan fráboðan.

Hann vísir á, at tað serliga er Norsk Veritas, sum av og á kemur á vitjan, men sum skilst, hevði tað størri ávirkan á hugburðin hjá monnum, tá ið Statens Skibstilsyn stóð fyri hesum eftirliti.

- Tað er eingin ivi um, at eftirlitið við føroyska skipaflotanum var nógv meira sjónskt fyri yvirtøkuna, sigur skiparin, sum Sosialurin hevur tosað við.

Ein maskinmaður, sum vit eisini hava tosað við, váttar tað, sum fiskimenn og skipari siga um hesi viðurskifti.

# Fara at gera eina nøgdsemiskanning

**- Vit fara at gera eina nøgdsemiskanning millum ymisku bólkarnar, sum vit hava við at gera. Hetta hevur einki við "søgurnar" at gera, sum ganga, men vit vilja hava fakta á borðið, sigur Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri á Skipaeftirlitinum**

SKIPAEFTIRLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjóri á Skipaeftirlitinum seinastu árini hevur verið Óli Hans Hammer Olsen og maðurin, sum er komin í hansara stað, er Vilhjálmur Gregoriussen.

Viljálmur er útbúgvin skipsførari og hevur harafturat tikið útbúgving sum siviløkonomur og teldufrøðingur. Hann hevur í mong ár arbeitt innan sjóvinnuøkið og hevur eisini starvast hjá danska Søfartsstyrelsen.

Í desember 2004 høvdu vit grein í Sosialinum um, at tað ikki longur er ókeyis hjá skipa-og báteaigarum at fáa trygdarútgerðina kannaða. Hetta gjald er komið, síðan Skipaeftirlitið varð yvirtikið á føroyskar hendur. Orsøkin er, at tað nú er klassin, sum ger hetta arbeiði fyri Skipaefirlitið.

Í greinini varð víst á, at tað kann kosta upp í einar 10.000 krónur at fáa trygdarútgerðina umborð á einum línuskipi kannaða.

At hetta er rætt, váttaði táverandi stjórin á Skipaeftirlitinum, Óli Hams Hammer Olsen.

Tá ið trygdarútgerð umborð á føroyskum skipum verður kannað í dag, er tað klassin, sum ger hetta arbeiði, og fyri henda ómakin fær reiðaríið eina rokning, sum kann liggja millum 5.000 og 10.000 krónur.

Eftirlitið verður gjørt sambært løgtingslóg um trygd á sjónum, sum er frá 2001.

### Nøgsemiskanning

Stjórin á Skipaeftirlitinum Vilhjálmur Gregoriussen sigur, at stovnurin nú fer undir at gera eina nøgdsemiskanning, men henda kanning hevur einki við møguligar søgur um eftirlit at gera.

- Hetta er ein kanning, sum vil gjarna vilja gera fyri at fáa fakta á borðið og fyri at fáa at vita, um ymisku bólkarnir eru nøgdir við eftirlitið.

Stjórin dugir ikki at siga, um tað kann hava sína ávirkan á virðingina fyri trygdini, at Skipaeftirlitið í størri mun hevur aðrar at gera hetta arbeiði fyri seg.

- Tað hoyrist so mangt, men vit kunnu ikki taka hesi "ryktir" í álvara, fyrr enn vit hava fakta á borðinum, sigur Vilhjálmur Gregoriussen, sum gjarna vil hava at hoyra, hvat ymisku bólkarnir halda um eftirlitið og ta tænastu, sum stovnurin veitir.

Stjórin sigur, at fundir verða við ymiskar viðskiftabólkar í næstum.